# Oljuumsitingin vitjar oljupall í Norðsjónum

*Stórur áhugi er millum oljufeløg at hitta umboð fyri føroysku oljufyrisitingina og oljuráðleggingarnevndina í sambandi við »Offshore Europe '95«. Í gjár varð vitjað úti á einum av teimum stóru oljupallunum í Norðsjónum, »Berryl«*

Ein týðandi partur av stóru føroysku delegatiónini her á oljuframsýningini í Aberdeen er oljuumsitingin og oljuráðleggingarnevndin. Hesir báðir almennu stovnarir hava gjørt ymiskt tilfar, sum verður víst fram á føroyska básinum. Tað snýr seg um, hvussu langt vit eru komin við seismiskum kanningum, hvørjar uppgávur hesir stovnar røkja osfr.

Á odda fyri oljuumsitingini er Martin Heinesen, meðan Árni Olafsson stendur á odda fyri oljuráðleggingarnevndini. Teir hava havt nógv at gera í Aberdeen, tí tey mongu oljufeløgini, sum vitja framsýningina og eru við til ráðstevnuna, hava stóran áhuga fyri Føroyum sum eini komandi oljuprovins.

Týsdagin hittu føroysku umboðini fólk frá stóra amerikanska oljufelagnum Conoco. Hetta er eitt felag, sum vit ikki hava hoyrt so nógv um í Føroyum. Felagið hevur annars fingið tillutað fleiri borloyvi har norðuri stutt frá føroyska markinum.

Mikudagin vóru oljuumsiting og oljuráðleggingarnevnd so gestir hjá stóra samtakinum »The Atlantic Margin Groupe«, sum fevnir um feløgini Statoil, Mobil Oil og Enterprice Oil. Talan var ikki um nakran vanligan fund. Føroyingarnir skuldu nevniliga við tyrlu út at vitja ein av teimum stóru oljupallunum í Norðsjónum, »Berryl«, sum Mobil Oil stendur sum operatørur fyri.

Hetta er fyrstu ferð, at øll tann føroyska oljufyrisitingin og partur av oljuráðleggingarnevndini fær høvi at kunna seg um arbeiðið og lívið umborð á einum oljupalli.



*Tey vitjaðu oljupall í Norðsjónum*



*Oljuumsitingin vitjaði í gjár Berryl oljupallin í Norðsjónum*



**Jan Müller**
**úr Aberdeen**

# Úr at gera á føroyska básinum

*Stórur áhugi fyri Føroyum*

Á føroyska básinum á »Offshore Europe '95« hava tey úr at gera. Nógv fólk vitja fyri at frætta um Føroyar, hvussu langt vit eru komin við kanningum av undirgrundini og útbjóðing av kanningarloyvum og annars hvat vit hava at bjóða eini komandi oljuvinnu av tænastum o.l.

Básurin er sera væl uppsettur og stendur avgjørt mát við aðrar básar á framsýningini. Neyvan nakrantíð er heldur gjørt so snotuligt og upplýsandi tilfar um Føroyar og tær tænastur, sum annars eru.

Upprunaliga skuldu vera millum 20 og 30 fyritøkur, feløg og stovnar við á básinum, men síðani eru fleiri komin aftrat við tilfari, sum nú saman gevur eina hampuliga heildarmynd av Føroyum og hvat vit hava av virkjum, virksemi o.l.

Nevnast kann, at ikki minst tær føroysku kommunurnar vísa framsýningini stóran ans. Ikki færri enn 13 kommunur gera vart við seg í faldarum o.l. Fleiri teirra hava so eisini fólk her.

Vit søgdu fyrr í vikuni, at Runavíkar kommuna var við fyri Eysturoynna. Hetta er ikki heilt beint. Tær fimm kommunurnar við Skálafjørðin og Kongshavnar Havn hava saman gjørt tilfar um tænastur, sum hesin parturin av landinum kann veita eini komandi frálandavinnu.

Tilsamans 1800 framsýnarar úr 22 londum eru við á framsýningini. Roknað verður við uml. 25.000 vitjandi hesar dagarnar framsýningin er opin. Umframt framsýningina, sum í høvuðsheitum fevnir um alt, sum hevur við útbúnað til frálandavinnuna at gera, er ein ráðstevna við ymsum fyrilestrum.

Evnini eru rættuliga teknisk og snúgva seg m.a. um oljuboring. Men eisini umhvørvi, kappingarføri og nýggju oljuøkini vestan fyri Hetland eru á skránni.

Í gjár vitjaðu fleiri av føroysku luttakarunum høvuðsstøðina hjá BP, har greitt varð frá teimum veitingum og tænastum, sum BP hovur brúk fyri í nýggju oljuprovinsini vestan fyri Hetland. Eisini varð vitjað á eini stórari útgerðarstøð nærhendis Peterhead norðan fyri Aberdeen.




*Menningarstovan og Team 85 hava gjørt eitt gott arbeiði. Føroyski básurin smæðist ikki burtur imillum hinar*

*Mynd kalmar*